# **Glitnir** júst havt føðingardag

**Í hesum døgum eru 4 ár síðani, at Glitnir lat upp á Skálatrø í Havn**

**UNDIRHALD**

Tað hevur gingið væl hesi árini, Glitnir hevur verið opið. Glitnir er pub og dansistað, men eisini hava tey lagt seg eftir nøkrum heilt serstøkum, tá tað ræður um mat. Tey gera nevniliga perlubúffar. Hugskotið kom av, at Perlan í Havn á sinni bjóðaði sera vælsmakkandi búffar, perlubúffar nevndir, og hetta hugskot hevur Glitnir nú tikið til sín. Køkurin í Glitnir er opin hvønn dag frá 11:30 til 18.:00.

### Dart og annað

Glitnir skipar javnan fyri ymsum tiltøkum og kappingum, og er sera virkið, tá tað ræður um at undirhalda tey vitjandi.

Dart verður spælt og skipað verður fyri kappingum, ið ofta savna nógvar luttakarar. Ein dartkapping verður fyri ólavsøku.

Karaoke kappingar eru væl dámdar. Har sleppa fólk at royna seg sum sangarar, og er hetta sera væl umtókt. Glitnir er kent fyri júst hesar kappingar og í næstum er ein ferð til Finnlands at vinna.

### Live

Í løtuni er summarsteðgur viðvíkjandi dansinum, ið annars er javnan við livandi tónleiki. Men livandi tónleikur er tó framvegis hvørt hóskvøld.

Fótbóltsfjepparar eru eisini glaðir fyri at vitja, og Glitnir bjóðar góðar umstøður at hygga at fótbólti.

### Hugni

Glitnir liggur væl fyri við sjóvarmálan og hugnaligt er eisini á terrassuni. Og júst hugnin er eyðkendur fyri staðið á Skálatrø.














